# Ringt at gera hol í sjógvin upp á ein mánað



**Elin Lindenskov hevur tikið sæti á tingið fyri Katrin Dahl Jacobsen, men tað er ringt at gera so øgiliga nógv upp á ein mánað**

TINGARBEIÐI
*Áki Bertholdsen*

Nú hevur Elin Lindenskov tikið sæti á Løgtingið fyri Katrina Dahl Jacobsen, sum er á ST fundi í New York.

Men hon ásannar, at hetta er ógvuliga deydlig tíð í tinginum, so tað verður ringt at gera hol í sjógvin hesa tíðina.

Hon sigur, at hon fer at taka virkið lut í teimum málum, sum koma fram, men um hon sjálv fer at leggja nøkur mál fyri tingið, veit hon ikki rættiliga, tí tíðin er so stutt.

Men hon hevur fleiri mál, hon kundi hugsa sær at reist, serliga um tíðin var longri. Eitt nú heldur hon, at spurningurin um umhvørvi liggur á láni, tí tað vísir seg, at landið leggur alla ábyrgdina av umhvørvispolitikkinum út á kommunurnar.

Men samstundis heldur hon, at okkum tørvar ein yvirskipaðan umhvørvispolitikk, tí tað kann ikki vera rætt, at agenda 21 skrivstovan skal detta niðurfyri, av tí at nakrar kommunur ikki kunnu semjast um, hvat hon skal vera.

Eitt týðandi mál fyri konufólk, hevur verið umrøtt eitt sindur og tað er spurningurin um fosturtøkur. Har ásannar Elin Lindenskov, at hon er grundleggjandi ósamd við landsstýrismannin í tí, hann hevur ført fram.

– Tað er nógv betri, at onki hendir í málinum, enn at miðflokkurin sleppur at sleppur at hóreiggja sær, tí tað fer bara at gera støðuna verri.

Hon er somuleiðis av teirri áskoðan, at fosturtøkur eru ikki nakar trupulleiki í Føroyum.

– Hetta er eitt stórt mál og eg ivist í, um nakað hendir hesa tíðina, eg siti í tinginum, men skuldi tað verið, verðið eg sjálvandi virkin í tí, sigur Elin Lindenskov

# Løgtingið til Suðuroyar at ferðast

**Í næstu viku fáa suðuroyingar sjáldsama vitjan, tí tá fer alt Løgtingið suður at vitja**

KANNINGARFERÐ
*Áki Bertholdsen*



*Mikukvøldið og hósdagin í næstu viku fer alt Løgtingið eina upplýsandi ferð til Suðuroyar*

Í næstu viku fáa suðuroyingar bæði forvitnisliga og sjáldsama vitjan. Tá fer Føroya Løgting nevniliga eina kunningarferð til Suðuroyar.

Løgtingið fer suður við Smyrli mikukvøldið 25. september og norður aftur hóskvøldið 26. september.

Edmund Joensen, løgtingsformaður, sigur, at tað vóru suðuroyartingmenninir sum reistu spurningin fyri formansskapinum í Løgtinginum um at alt Tingið skuldi fara suður at eina kunnandi ferð.

– Formansskapurin hevur síðani viðgjørt áheitanina og hevur gjørt av gera eftir henni og ferðin verður sostatt í næstu viku.

Edmund Joensen sigur, at skráin fyri ferðina er ikki heilt greið enn, men ætlanin er at fara so víða um í Suðuroynni sum yvirhøvur gjørligt, sigur hann.

Eftir, hvat skilst, er ætlanin at vitja á ymsum stovnum, eitt nú sjúkrahús og ellisheim, men ætlanin er eisini at kunna seg um vegakervið, um havnaviðurskifti og um samferðsluviðurskiftini annars, eins og ætlanin er at hitta býráð og bygdarráð.

Løgtingsformaðurin sigur, at heilt nógvir løgtingslimir hava boðað frá, at teir vera við á ferðini.

So vítt, vit vita, er hetta fyrstu ferð, at alt Løgtingið fer eina kunnandi ferð, sum hesa, í hvussu so er í nýggjari tíð, men hann heldur, at tað er eitt frálíkt hugskot at gera slíkar ferðir.

– Hetta er avgjørt ein ferð, sum løgtingslimir eiga at fáa stóra nyttu burturúr, ikki minst nú ein fíggjarlógarviðgerð stendur fyri framman og í tí sambandi skal m.a. tosast um stórar útbyggingar í Suðuroynni, bæði um nýggjar havnir, um tunlar og um betri vegir.

– Tað eigur at gera tinglimir betri før fyri at tosa um viðurskiftini at hava sæð tey við egnu meygum og at hava hoyrt, hvat fólk á staðnum hava at siga, sigur Edmund Joensen.

Um fleiri ferðir av hesum slagnum verða gjørdar, veit løgtingsformaðurin ikki.

Men hann kundi hugsa sær at løgtingslimir, serliga tær ymsu nevndirnar, áttu at gjørt meiri burturúr at ferðast kring landið at kunna seg um ymisk viðurskifti, tí tað heldur hann at ov lítið verður gjørt við. Men hann heldur eisini, at alt Løgtingið eigur at gera fleiri slíkar ferðir.

# Hevur onga viðmerking til miðflokkin

**– Havi eg nakað at siga við miðflokkin í sambandi við siðseminevndina, sigi eg tað við flokkin sjálvan, sigur formaður tjóðveldisfloksins**

SAMGONGUSTEV
*Áki Bertholdsen*



*Høgni Hoydal er ikki sinnaður at taka lut í kjakinum um siðseminevndina, miðflokkin ella nýggja samgongu*

Formaðurin í tjóðveldisflokkinum, Høgni Hoydal, ger ongar viðmerkingar til støðuna, sum hevur tikið seg upp í samgonguni, eftir at Bill Justinussen valdi siðseminevndina av nýggjum.

Tað ger hann púra greitt fyri Sosialinum í gjáramorgunin.

Hann hevur hann nakað at siga um hetta málið, sigur hann tað við miðflokkin sjálvan og ikki við tíðindatænastuna.

Hann sigur at tjóðveldisflokkurin hevur eina politiska avtalu og hana fer flokkurin at halda. Og eru tað onkrir av samstarvsfeløgunum, sum ikki halda avtaluna, fer flokkurin at taka málið upp við tann partin og fer ikki at viðgera tað alment, tí tað er hann ikki vanur til – og tí fer hann heldur ikki enn alment at gera viðmerkingar til málið.

Um hann metir støðuna soleiðis, at miðflokkurin hevur brotið nakra avtalu, vil hann heldur onki siga um.

Men hann viðgongur kortini, at talan er um ein trupulleika í samgonguni, men tað fer tjóðveldisflokkurin at taka upp við miðflokkin sjálvan.

– Mítt fremsta endamál er at halda tær politisku avtalur, sum eru gjørdar. Men tá ið trupulleikar stinga seg upp – og hetta er avgjørt ein trupulleiki – verða teir tiknir upp innanhýsis í samgonguni og ikki í fjølmiðlunum.

Ein annar spurningur, sum er umrøddur í kjalarvørrinum á spurninginum um siðseminevndina, er, um tað yvirhøvur var rætt at taka miðflokkin við í samgonguna, nú vit líta aftureftir og mugu ásanna, at flokkurin hevur longu skapt øsing við umstríddum útsøgnum í tveimum eymum málum, málinum um fosturtøkur og málinum um siðseminevndina.

Tað eru tey sum halda at frægasta loysnin hevði verið at fingið javnaðarflokkin við í eini samgongu, og koyrt miðflokkin til hús, so at vit fingu eina sterka samgongu.

Summi halda, at tjóðveldisflokkurin og samgongan sum heild nú liggja sum tey hava reitt, tí tað var ikki annað væntandi av miðflokkinum og eitt nú helt Tórbjørn Jacobsen, tingmaður fyri tjóðveldisflokkin, at ein samgonga ímillum fólkaflokkin, javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin var frægasta loysnin, soleiðis sum politiska støðan var beint nú.

Men heldur ikki hetta hevur Høgni Hoydal nakra sum helst meining um alment.

Hann endurtekur, at tjóðveldisflokkurin er í eini samgongu í løtuni.

– Vit hava eina avtalu og hana fara vit at halda og hinum kjakinum eri eg ikki sinnaður at taka lut í.



# Ísvirkið í Sørvági letur uppaftur

**Ísvirkið í Sørvági er undir umvæling og verður væntandi liðugt at taka í brúk um ein mánaða ella so**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*



*Tá ísvirkið í Sørvági letur upp aftur um ein mánaða, sleppur Vinjard Joensen frá at koyra til Miðvágs eftir ísi*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Sørvági:** Um ein mánað ella so fer aftur at bera til hjá skipum og bátum at taka ís í Sørvági.

Gamla ísvirkið hevur ligið stilt í umleið hálvtann-að ár, sigur Vinjard Joensen, sum nú er við at rigga ísvirkið til aftur, so ísur aftur fæst á havnarlagnum í Sørvági.

Vinjard Joensen, sum eigur landingarmiðstøðina í Sørvági, sigur, at tað er ov trupult at arbeiða, tá ein noyðist til Miðvágs eftir hvørjari ístirnu, sum brúkast skal á havnarlagnum í Sørvági.

Bæði útróðrarbátar og eisini størri skip landa til landingarmiðstøðina í Sørvági, og serliga stóru skipini skulu hava ís umborð aftur.

Higartil hevur verið neyðugt hjá teimum at farið til Miðvágs eftir ísi, men tað fer at broytast um ein mánaða ella so, tá ísvirkið aftur fer í gongd, sigur Vinjard Joensen.

Hann væntar, at ta man fara at kosta umleið eina millión at gera ísvirkið aftur í brúkiligan stand.

Vinjard Joensen sigur, at tað er nakað av útróðri í Sørvági, og at bátarnir hava hampiligan fiskiskap.

# Nýggjur útróðrarbátur til Miðvágs

**Miðvingar hava keypt ein útróðrarbát úr Noreg. Hann er 24 tons til støddar og smíðaður úr stáli**

ÚTRÓÐUR
*Edvard Joensen*



*Útróðrarbáturin Presttangi er keyptur úr Noreg fyri umleið fimm milliónir krónur*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Miðvági:** Enn eitt nýtt far kemur í flotan fyrsta dagin. Tað er útróðrarbáturin »Presttangi«, sum skal koma í flotan í staðin fyri Havbúgvan, sum verður lagdur.

Tað er reiðaríið Vestline í Miðvági, sum hevur fingið hendan nýggja bátin. Hann er merktur 24 tons og hevur 400 HK maskinu. Báturin er smíðaður úr stáli í 1995, greiðir Tummar Jacob á Løgmansbø, reiðari, frá. Hann er útgjørdur við egningarmaskinu umframt teimum hentleikum á brúnni, sum í dag krevjast. Báturin er yvirdekkaður í bakborð. Fimm mans fara at rógva út við Presttanga, sum fer í drift, so skjótt skráseting og tílíkt er komið upp á pláss.

Presttangi kemur í flotan fyri 50 tonsaran Havbúgvan, sum Vestline keypti av Eiði í vár. Havbúgvin veður nú lagdur, og Presttangi fer at brúka fiskiloyvið hjá honum til útróður undir Føroyum.

Tó verður bara partur av fiskiloyvinum hjá Havbúgvanum flutt yvir á Presttanga, tí West Freezer hjá sama reiðaríði brúkar ein part av tí. Nevniliga íslandsloyvið.

Kostnaðurin fyri Presttanga er einar fimm milliónir, sigur Tummas Jacob á Løgmansbø. Tá er prísurin fyri Havbúgvan ikki roknaður við. Hann var umleið tvær milliónir.

Tó metir reiðarin ikki, at tað ber til at siga, at Presttangi stendur teimum í sjey milliónum, tí partur av fiskiloyvinum hjá Havbúgvanum fór jú til West Freezer, vísir hann á.

Hvat nú verður gjørt við Havbúgvan, veit Tummas Jacob á Lømansbø ikki, men roynt verður at selja hann. Hann ásannar tó, at tað verður helst ringt uttan fiskiloyvi.

Í ørðum lagi verður roynt at selja útgerðina úr Havbúgvanum. Eitt nú snellurnar, sum eru umborð.

# Viðgerðin eigur at vera heima

**Tá landsstýrismaðurin við heilsumálum setti ráðstevnuna um krabbamein í Norðurlandahúsinum í gjár, fegnaðist hann um, at partar av krabbameinsviðgerðini kunnu latast í Føroyum**

RÁÐSTEVNA
*Edvard Joensen*



*Bill Justinussen, landsstýrismaður, fegnaðist í setanarrøðu síni um, at viðgerð fæst í Føroyum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Landsstýrismaðurin við heilsumálum er bjartskygdur, tá hann tosar um viðgerð av krabbasjúkum í Føroyum.

Bill Justinussen, landsstýrismaður við familju- og heilsumálum, setti í gjár ráðstevnuna um krabbasjúkur, sum hildin varð í Norðurlandahúsinum í samband við, at tað eru liðin 10 ár, síðan Onkologiskt Ambulatorii fór at virka í Føroyum.

Stóri salurin í Norðurlandahúsinum var at kalla fullsettur av fólki, sum komið var at lýða á tað, sum fór at verða borið fram. Ráðstevnan vardi allan dagin, og var meginparturin av skránni settur við ymsum fakligum fyrilestrum, sum hava við krabbameinssjúku og viðgerð at gera. Eisini varð sagt frá Føroya Felag móti Krabbameini, eins og ein sjúklingur, sum lektur er, fór at siga frá síni søgu.

Fyrilestrahaldarar vóru komnir bæði úr Danmark og Íslandi, eins og eisini fleiri føroyingar vóru millum teirra, sum høvdu orðið.

Ráðstevnan byrjaði við, at formaðurin í Føroya Felag móti Krabbameini, Jákup N. Olsen, beyð vælkomin.

Hann fegnaðist um tann møguleika, føroyingar fingu at fáa viðgerð heima í Føroyum og vísti á tann týdning, tað hevur fyri sjúklingin at kunna verða verandi í kendum umhvørvi.

Eftir at Jákup Olsen hevði boðið vælkomin, fekk Bill Justinussen, landsstýrismaður, orðið til at seta ráðstevnuna.

– Tryggjast má alla tíðina, at góðskan í viðgerðini er í lagi, segði Bill Justinussen millum annað.

Og tað metti Bill Justinussen, at hon í løtuni er, samstundis sum hann fegnaðist um, at tað nú ber til at fáa partar av viðgerðini í Føroyum. Og hann segði seg vera bjartskygdan, tá hann hugsaði um framtíðina. Hann hugsaði serliga um telemedecinska viðgerð, segði landsstýrismaðurin.

Eisini fegnaðist landsstýrismaðurin um avtaluna við Ríkissjúkrahúsið, sum eigur at haldast viðlíka og helst útbyggjast.

Bill Justinussen nýtti ein stóran part av røðu síni til at tosa um hospice, sum hann metti vera av stórum týdningi, tá onnur viðgerð var uppgivin.

Og tað tykist, sum brúk er fyri hospice í Føroyum, tá ein hoyrir tølini, Bill Justinussen nevndi. Hann segði, at hvørt ár doyggja umleið 100 føroyingar av krabbameini, umframt at 150 til 200 nýgggir tilburðir verða staðfestir árliga.



*Heilt nógv fólk var í Norðurlandahúsinum, tá ráðstevnan varð sett*

*Mynd: Jens Krisitan Vang*